# Maskinskúlin í 40 ár




*Finnur Johansen tykist væl nøgdur um bókina, sum nú er at fáa til keyps. Hon er 309 síður til støddar og kostar 290 kr.*

**Finnur Johansen, fyrrverandi lektari á Maskinskúlanum, hevur skrivað bók um fyrstu 40 árini hjá skúlan**

BÓKAÚTGÁVA
*Jákup Mørk*

Bókin lýsir søgu maskinskúlans hesi árini, kor hansara og avrik.

Maskinskúlin varð til, tí at nýggj lóg um at útbúgva maskinfólk kom í 1958, sum setti størri krøv til høli, laboratoriu og lærarar, og donsku myndugleikarnir kravdu, at skúlin var ein sjálvstøðugur stovnur leysur av øðrum skúlum. Skúlin var fyrstu fjórðingsøldina danskur og goldin úr danska ríkiskassanum.

Eftir at vit í 1948 fingu heimastýrisskipanina, varð maskinmeistaraútbúgvingin verandi felagsmál, sum vóru tey, ið ikki vóru yvirtikin. Útbúgving av maskinfólki varð tí á donskum hondum.

Eisini eftir at skúlin var yvirtikin, og vit høvdu fingið føroyska lóggávu, vóru okkara krøv tey somu sum tey donsku, tí avtalað varð at føroyska útbúgvingin í minsta lagi skuldi vera á hædd við ta donsku.

Føroya Maskinskúli fór í 1965 undir skeið til maskinistprógv, føroyska maskinprógvið og maskinmeistaraprógvið. Í 1987 varð farið at lesna til víðkaða maskinmeistaraprógvið og skeið fyri motorpassarar, í 1989 fyri elinnleggjarar, í 1998 fyri kølimontørar og í 2001 fyri ketilpassarar.

Løgtingslóg um at útbúgva maskinfólk kom í 1992, og eftir tað varð maskinskúlin yvirtikin. Í 2001 kom nýggj løgtingslóg um at útbúgva maskinfólk.

Fyrstu árini, frá 1965 til 1974, leigaði skúlin frá sjómansskúlanum. Í 21 ár, frá 1974 til 1995, tá Føroya Maskinskúli fekk egin hús undir Krákugjógv, var skúlin í Rættará.

Høvuðsdenturin er lagdur á at lýsa maskinskúlan sum útbúgvingarstovn, og á menning og umstøður hansara.

Í bókini er myndir av flestu flokkum, yvirlit yvir øll, sum hava tikið prógv á maskinskúlanum, umframt teimun, ið hava virkað við skúlan. Til samans hava 1.225 lesandi tikið 1.888 teknisk prógv hesi 40 árini.

veitst tú ikki tað?
Sosialurin




## KROSSORÐ




## Vinnari:

*Rosa Strøm*
*Hoyvíksvegur 43*
*100 Tórshavn*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: FLÁBAND

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| F | E | G | N | A | S | T | T | A | Ð | F | L | Ý | G | U | R |
| R | | G | L | A | T | A | | T | | L | A | T | A | | U |
| A | E | G | | | E | R | T | A | | Á | N | A | | E | M |
| N | I | | B | | V | I | I | | N | | D | | Ø | R | N |
| S | N | E | I | S | | | N | I | E | L | S | E | N | | Æ |
| A | H | O | R | N | | | G | | S | A | A | R | | | T |
| H | E | S | T | A | R | N | I | R | | N | T | | | J | U |
| Ú | R | | | R | | A | | A | G | G | | Í | S | U | R |
| S | J | Ó | V | A | R | B | Ó | N | D | I | N | | I | R | |
| 442 | A | K | I | | | B | Ó | K | | | L | O | G | I | K |
| M | R | | L | A | M | A | | I | A | N | | | N | S | J |
| A | | E | | | Ø | | C | | G | O | L | G | A | T | A |
| T | O | D | N | E | S | H | A | G | I | | | Á | B | A | L |
| A | T | V | I | N | N | A | | E | T | I | N | | Ø | R | N |
| R | A | I | N | I | | L | Á | S | | N | | T | U | | E |
| Á | R | N | A | D | A | L | S | T | I | N | D | U | R | | S |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

__ __ __ __ __

**443**

Loysunarorðið: ........................................

Navn: ........................................................

Bústaður: ..................................................

Bygd/býur: ................................................

## *Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!*

Frá **BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:**

- ☐ **Okkara kokkar** - *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** - *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** - *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** - *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá **FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:**

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** - *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** - *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar***
***- bæði innan og uttan skúlagátt***